# Vegleiðing til eSkatt.fo

Tað fyrsta sum tú verður biðin um á **eSkatt.fo** er at skriva títt p-tal og títt loynital.




Bæði á tí framskundaðu skattauppgerðini (bláa skjalinum) og á sjálvuppgávuni (grøna skjalinum) finnur tú **loynitalið** niðast í høgra horni.







Loynitalið kennir bara tú. Tað eru ikki avmarkingar í, hvussu ofta tú kanst brúka loynitalið. Tó so, at tá tú hevur sent internetsjálvuppgávuna inn, verður hon skrásett hjá TAKS uml kl. 7 morgunin eftir. Eftir hetta ber ikki til at rætta í internetsjálvuppgávuni.

Tá teigarnir p-tal og loynital eru fyltir út, verður loggað á við antin at trýsta á teigin 

ella við at trýsta á **Enter** á knappaborðinum.

Tú ert nú komin inn á internetsjálvuppgávuna. Tú kanst logga av, uttan at senda inn internetsjálvuppgávuna, við at trýsta á her.

Her sæst um internetsjálvuppgávan er send ella ikki.



Longur niðri á síðuni kemur tú til teigarnar á sjálvuppgávuni. Kolonnan **Skattavaldið** vísir hvat tú ert skrásett/ur fyri hjá TAKS.




Er upphæddin ikki røtt, skalt tú seta røttu upphæddina í kolonnuna **Skattaborgarin**

Vegleiðing er til allar teigarnar. Vegleiðingin sæst við at klikkja á spurnarteknið.

Vegleiðingin verður latin aftur við at klikkja á tann reyða krossin




Tá tú ásetur p-tali hjá børnum skal p-tal skrásetast soleiðis: 141294055 ella við bindistriku 141294-055 trýst síðani á Goym p-tal og p-talið er skrásett –síðani er klárt at skráseta næsta barn um fleiri skulu skrásetast. Talið av børnum tú hevur skráset sæst undir kolonnuni skattaborgarin



Um tú hevur inntøku av húsaleigu kanst tú skráseta hana her við at trýsta á 


Um tú uppgevur bruttoinntøkuna av húsaleiguni er ikki neyðugt at viðhefta fílu við roknskapi. Tó er frádrátturin max. 24.000 kr.




Vel markatalsbygd við at trýsta á pílin á høgru síðu á teiginum

Fram kemur niðanfyristandandi mynd har markatalsnr. kemur fram.

Skriva gøtunavni á bústaðnum sum verður útleigaður í teigin Bústaður




Fram kemur ein listi av øllum bústaðnum – vel leigubústaðin á listanum




Og fram kemur fylgjandi mynd har matrikulnr. nú eisini sæst á myndini




Skriva síðani brutttoupphæddina á tvs. leiguinntøku uttan frádrátt.og trýst á 

Nú skal tú fylla teigin fyri frádráttin
Er leiguinntøkan t.d. 19.000 kr. tvs. minni enn max. Loyvda frádráttin uppá 24.000 kr. skriva tá eisini 19.000kr í teigin frádrátt.



**Bruttoinntøka av húsaleigu**

| Matrikul | Bústaður | Upphædd |
| --- | --- | --- |
| 338 | Frammi í Gerði 16 Kvívík | 19.000,00 |
| | | **19.000,00** |

Stovna

Frádráttur (max. kr. 24.000) 19000

Legg til merkis at tú ikki kanst broyta upphæddinar í teigunum 101,180 og 185. Her hevur TAKS forprentað ta inntøku, sum er flutt um afturhaldsskipanina í tínum p-talið. Um tú hevur broytingar/viðmerkingar til hesar teigarnar, skal tað setast í teigin **viðmerkingar** niðast á síðuni.



**Lønarinntøkur**

| | | |
| --- | --- | --- |
| 101 | A-inntøka | 78.358 |
| 180 | Fiskiveiðuinntøkur eftir §25a í skattal. (frádráttir í teig 380) | 0 |
| 185 | Ítróttainntøka | 0 |
| 199 | Inntøka undir DIS-skipanini | 0 |

**Aðrar inntøkur**

| | | |
| --- | --- | --- |
| 220 | Inntøka av landbúnaði sbrt. hjálagda roknskap | 0 |
| 230 | Inntøka av húsaleigu sbrt. hjálagda roknskap | 0 |
| 240 | Inntøka av egnum virki sbrt. hjálagda roknskap | 0 |
| 251 | Fríur bilur Vel bilslag ... | 0 |

Hevur tú inntøku av landbúnaði, húsaleigu ella av egnum virki, skal roknskapur latast inn saman við sjálvuppgávuni.

Hetta virkar soleiðis, at tá tú ert liðug/ur við at fylla út sjálvuppgávuna og trýstir á send niðast á síðuni, kemur fram ein síða, sum vísir, hvørjar skrásetingar tú hevur gjørt.

Um tú hevur sett eina upphædd í teigarnar 220, 230 ella 240, fært tú boð um, at skjalprógv krevst til hesar teigarnar. Tú kanst so við at trýsta á **Browse** leita fíluna við roknskapinum fram í tínari teldu og knýta hana til sjálvuppgávuna. Legg til merkis: Bert ein fíla kann knýtast til hvønn teig.


Niðanfyri eru vístar tær skrásetingar, tygum hava gjørt.

| | Skattavaldið | Skattaborgarin |
|---|---|---|
| **Aðrar inntøkur** | | |
| 230 Inntøka av húsaleigu sbrt. hjálagda roknskap | 0 | 1334 |

Skjalprógvan krevst til teig 230: [ ] Browse...

Teigarnir K1 til K22 eru allir um kapitalvinningsskatt. Legg til merkis, at her er neyðugt at endurtaka forprentaðu upplýsingarnar hjá TAKS, hóast tú ikki hevur annað at leggja afturat.



| Vinningur av vinningsbýti o.a. | | | |
|---|---|---|---|
| K1 | Vinningur av partabrøvum v.m. | 0 | |
| K2 | Vinningur av fíggjarkrøvum og skuld | 0 | |
| K4 | Vinningur av keyps- og sølurættindum | 0 | |
| K5 | Vinningsbýti frá føroyskum feløgum | 0 | |
| K6 | Vinningsbýti frá útlendskum feløgum | 0 | |
| K7 | Rentuinntøkur frá føroyskum peningastovnum og postgiro | 0 | |
| K8 | Aðrar rentuinntøkur | 0 | |

Hevur tú í árinum selt partabrøv v.m., skal vinningurin/tapið gevast upp í ávikavist teigi K1 ella K11 Tá skalt tú stovna eina útgreining. Tað verður gjørt við at trýsta á her.


**Útgreining til pkt. K1 og K11**

Eingin útgreining skrásett

Stovna útgreining

Tú ført eina mynd fram, sum sær soleiðis út. Hevur tú selt partabrøv í ymiskum feløgum, og/ella hevur tú ikki keypt partabrøvini samstundis, verður ein útgreining skrásett fyri hvørt felag og fyri hvørja útveganardagfesting sær. Við at trýsta á her kemur ein álmanakki fram.




Tá tú hevur útfylt teigarnar trýst tá á Goym og tølini fara í teigarnar har teir hoyra heima

Útgreining skal stovnast fyri hvønn handil sær.

Tá tú heldur at sjálvuppgávan er fullfíggjað so trýst á 


Fram kemur niðanfyri standandi mynd

Niðanfyri eru vístar tær skrásetingar, tygum hava gjørt.

**Upplýsingarnar eru ikki sendar enn.**

| | Skattavaldið | Skattaborgarin |
|---|---|---|
| **Ymiskir upplýsningar** | | |
| 015 Frádráttarrættur fyri børn - fødd 1991 og yngri | 0 | 0 |
| **Vinningur av vinningsbýti o.a.** | | |
| K7 Rentuinntøkur frá føroyskum peningastovnum og postgiro | 5,86 | 5,86 |
| **Goldin skattur** | | |
| K20 Goldin skattur av rentum úr Føroyum | 2,04 | 2,04 |

Um tygum vilja rætta, so trýst á knøttin "Rætta".
Um skrásetingarnar eru ílagi, so trýst á knøttin "Send".

Rætta | Send

---

Tú hevur tó framvegis ikki skrásett sjálvuppgávuna endaliga, men kemur inn á eina síðu, sum vísir hvat tú hevur skrásett á sjálvuppgávuni.

Her ber til hjá tær at hyggja eftir, hvat tú hevur sett á sjálvuppgávuna og á henda hátt tryggja tær, at tú hevur fylt sjálvuppgávuna rætt út.

Um tú hevur sett eina upphædd í teigarnar 220 -240, fært tú boð um at skjalprógv krevst, og her hevur tú so møguleikan at knýta eina fílu til sjálvuppgávuna ella at merkja av, at skjalprógv verður sent við posti.

Um okkurt er, sum ikki er heilt rætt enn, so trýst á **rætta.** Tú kemur tá aftur til internetsjálvuppgávuna hjá tær.

Tá tú hevur tryggjað tær, at tú hevur fylt sjálvuppgávuna rætt út so trýst á **kanna**.og síaðani á **send**

Tú hevur nú sent sjálvuppgávuna inn til TAKS umvegis eSkatt.fo og hevur tú nú møguleikan at skriva allar upplýsingarnar út við at trýsta á **Útskriva** (sí myndina niðanfyri)




Um tú loggar teg á internetsjálvuppgávuna enn einaferð stendur nú, at sjálvuppgávan er send og nær.




Tú kanst tó framvegis fara inn og rætta í sjálvuppgávuni til umleið kl 7 morgunin eftir, tá sjálvuppgávan hjá tær verður skrásett í skipanini hjá TAKS.